umhvørvisstovan

ELFELAGIÐ SEV
LANDAVEGUR 92
POSTBOX 319
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

Argir hin 16. juli 2013
Málsnr.: 13/00210-4
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Maria Gunnleivsdóttir Hansen

# Umhvørvisgóðkenning

# av vindmyllum hjá Elfelagnum SEV í Húsahaga

## 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av vindmyllum hjá Elfelagnum SEV á matr. nr. 1175a í Húsahaga og matr. nr. 1160a í Flatnahaga er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóggávu.

## 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk hin 29. apríl 2013 umsókn um umhvørvisgóðkenning av vindmylluverkætlan frá Elfelagnum SEV.

Í umsóknini eru upplýsingar um ætlaða virksemið, og verður m.a. víst til umhvørvisárinsmetingina[1] fyri verkætlanina, sum varð latin Umhvørvisstovuni til góðkenningar tann 22. apríl 2013, hetta smb. kravi í § 16 í elveitingarlógini, um at umhvørvisárinsmeting skal gerast áðrenn loyvi til ravmagnsframleiðslu verður latið.

## 3. Lýsing av virkseminum

Vindmyllurnar verða eftir ætlan settar upp á sumri 2014 á matr. nr. 1175a í Húsahaga og matr. nr. 1160a í Flatnahaga, sum er í fjórða grundumráði í Tórshavnar kommunu. Sambært §25 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, eru vindmyllur loyvdar í hesum øki við tí treyt, at serstøk

---

[1] Umhvørvisárinsmeting av vindorkuætlan í Húsahaga. Apríl 2013. SEV. US mál 13/00038-6

byggisamtykt verður gjørd, galdandi fyri vindmyllurnar og tilhoyrandi virksemi. Serstøk byggisamtykt, ið loyvir vindmyllum á økinum, varð góðkend av Innlendismálaráðnum tann 27. juni 2013.

Vindmyllurnar skulu framleiða elorku, sum verður latin inn á elnetið hjá SEV.

Trettan vindmyllur av slagnum ENERCON E-44 við 900 kW generatori, verða settar upp, níggju í Húsahaga og fýra í Flatnahaga. Hvør mylla er 45 metur høg, og veingjabreiðið er 44 metrar. Við hvørja myllu verður eitt 20x30 m stórt arbeiðspláss gjørt.

Atkomuvegurin til vindmyllurnar fer ætlandi at verða íbundin vegin niðan á Húsareyn (til mastrina hjá Føroya Tele). Frá vindmyllunum verður lagdur elkaðal til eina nýggja 60 kV koblingsstøð við Oyggjarvegin. Vindmyllurnar eru mettar at framleiða 42,7 GWh um árið.

Vindmyllurnar eru sambært SEV góðkendar eftir IEC klassa IA(s), sum er besti altjóða góðkenningar-klassi, tá talan er um vindviðurskifti, so sum høg vindferð og nógvur turbulensur.

## 4. Lýsing av umhvørvisviðurskiftum

Elfelagið SEV hevur gjørt eina umhvørvisárinsmeting fyri virksemið, sum í breiðum høpi viðgerð árin, sum vindmyllurnar ætlandi kunnu hava á umhvørvið. Óljóð og skuggakast eru mest týðandi umhvørvisligu árinini. Eisini onnur árin kunnu koma fyri, t.d. endurskin.

*Óljóð*
Óljóð kemur frá vindmyllum, sum mæla, og økist óljóðið við vaksandi vindferð. Tó økist ljóðið frá vindinum sjálvum lutfalsliga meira og ofta hoyrist óljóð frá vindmyllum best tá vindmegin er 6 - 8 m/s. Óljóð frá vindmyllum kann vera til ampa hjá teimum, sum búgva nærhendis myllunum.

*Skuggakast*
Tá ein vindmylla stendur soleiðis fyri sólini, at malandi veingirnir kasta skugga, verður hetta nevnt skuggakast, sum kann fatast um ljós, ið blunkar. Skuggakast kemur mest fyri tá sólin stendur lágt á himni, t.e. í desember og januar mánað. Um skuggakast kemur fyri í bústaðarøki, kann tað vera ørkymlandi og til ampa hjá íbúgvum.

## 5. Málsviðgerð

Í sambandi við málsviðgerðina er serligur dentur lagdur á, at ampar av óljóði og skuggakasti eru minst møguligir, og at umhvørvið ikki verður dálkað.

Sambært umhvørvisárinsmetingini verður óljóðið og skuggakastið frá vindmyllunum undir ásettum markvirðum í næstu bústaðarøkjum. Í kap. 6 eru treytir settar til virksemið, herundir fyri óljóð og skuggakast.

Umsóknin, umhvørvisárinsmetingin og annað samskifti við SEV, umframt vegleiðing hjá Umhvørvisstovuni nr. 2011-13 um óljóð og norðurlendskar reglur um vindmylluvirksemi, hava verið grundarlag undir málsviðgerðini og góðkenningini.

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð tann 5. juli 2013 send SEV og Tórshavnar kommunu til viðmerkingar. SEV hevði tríggjar viðmerkingar, m.a. um umhvørvisstýrisskipanina. Tórshavnar kommuna hevði eina viðmerking um, at olja og onnur kemikalii ikki skulu dálka áir og løkir, sum renna í vatngoymslurnar í Villingardali og Havnardali. Umhvørvisstovan tók allar viðmerkingarnar til eftirtektar.

# 6. Góðkenningartreytir

Umhvørvisgóðkenningin er givin við niðanfyri nevndu treytum:

## 6.1. Almennar treytir

6.1.1. SEV skal boða Umhvørvisstovuni frá, tá farið verður undir verkætlanina. Verður verkætlanin ikki sett í verk innan tvey ár frá tí, at umhvørvisgóðkenning er lýst, fellur góðkenningin burtur.

6.1.2. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og verða kunnað um ta lóggávu, sum góðkenningin er grundað á.

6.1.3. Allar sýnistøkur og kanningar v.m., sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, ella sum SEV fær boð um at gera, skulu gerast av starvsstovu, sum kann góðkennast av Umhvørvisstovuni.

6.1.4. Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av SEV.

6.1.5. Virksemið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið økir um óljóð, skuggakast ella aðra dálking ella ampar, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

6.1.6. Eigaraskifti, navnabroyting ella avtøka skal fráboðast Umhvørvisstovuni. Um virksemið heldur uppat, ella mylla brotnar og gerst óvirkin, skal alt tilfar og øll útgerð beinast burtur og økið skal ruddast.

6.1.7. Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin, kunnu ikki gevast onnur boð ella forboð, enn ásett í hesi góðkenning, uttan so at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um ampar/árin.
- vindmyllurnar elva til dálking ella ampar/árin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- Árin og dálkingin í aðrar mátar eru størri enn góðkenningin er givin eftir.

6.1.8. Tá ið meira enn 5 ár eru gingin, eftir at góðkenningin er lýst, kann Umhvørvisstovan broyta treytirnar í góðkenningini, tá ið tað er umhvørvisliga grundað, ella um betri tøkni ella minni dálkandi framleiðsluhættir eru komnir fram.

## 6.2. Innrætting og rakstur

6.2.1. Vindmyllurnar skulu staðsetast, rekast og viðlíkahaldast soleiðis, at treytirnar í hesi góðkenning altíð verða hildnar.

6.2.2. Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað í minst møguligan mun hevur við sær ampar av t.d. óljóði, skuggakasti og endurskini.

6.2.3. SEV skal tryggja, at olja og onnur heilsu- og umhvørviskaðilig evni ikki dálka vatnveitingarøki, serliga áir og løkir, sum renna í vatngoymslurnar í Havnadali og Villingardali.

6.2.4. Alt burturkast skal handfarast í samsvari við galdandi reglur um burturkast[2] og skal latast til góðkendan móttakara.

6.2.5. Burturkast frá viðlíkahaldi o.ø. skal latast til góðkendan móttakara beinan vegin, sum viðlíkahaldsarbeiðið ella annað er liðugt, og má ikki goymast á staðnum, har vindmyllurnar standa.

---

[2] Kunngerð nr. 147 frá 19. oktober 1995 um burturkast, broytt við kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007.

6.2.6. Besta tøka tøknin (BAT[3]) skal í størst møguligan mun verða nýtt.

## 6.3. Óljóð

6.3.1. Samlaða óljóðsstøðið frá vindmyllunum, ásett sum ekvivalenta, korrigeraða óljóðsstøðið í dB(A), skal ikki fara upp um niðanfyri nevndu mørk:

(1) Á økjum, ið sambært kommunalu byggisamtyktini eru løgd av til bústaðir, stovnar, summarhús ella onnur frítíðarendamál, skal óljóð frá myllunum ikki fara upp um:

(a) 39 dB(A) tá vindferðin er 8 m/s og

(b) 37 dB(A) tá vindferðin er 6 m/s.

(2) Við bústaðir í økjum, sum sambært kommunalu byggisamtyktina ikki eru løgd út sum bústaðarøki, skal óljóð ikki fara upp um:

(a) 44 dB(A) tá vindferðin er 8 m/s og

(b) 42 dB(A) tá vindferðin er 6 m/s.

(3) Samlaða lágfrekventa óljóðið frá vindmyllum skal innandura í bústøðum ikki vera hægri enn 20 dB, bæði tá vindferðin er 8 m/s og 6 m/s.

## 6.4. Skuggakast

6.4.1. Skuggakast frá vindmyllunum skal í mesta lagið vera 10 tímar um árið í bústaðarøkjum.

## 6.5. Innaneftirlit og umhvørvisstýrisskipan

6.5.1. SEV skal hava ein umhvørvisstýrisskipan, sum tryggjar, at treytirnar í góðkenningini verða hildnar.

6.5.2. Umhvørvisstovan kann krevja, at SEV skjalprógvar, at treytirnar um óljóð og skuggakast verða hildnar.

6.5.3. Umhvørvisstovan kann krevja, at SEV ger serligar kanningar og greiningar fyri at meta um møguligar ampar ella árin frá virkseminum, tó í mesta lagi eina ferð um árið. Kanningarskrá skal tá frammanundan sendast Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

## 6.6. Rakstarskráseting og umhvørvisfrágreiðing

6.6.1. SEV skal skráseta hesar upplýsingar:

- Orkuframleiðsla (GWh/ár),
- Rakstrartrupulleikar/óhapp,
- Deyður ella særdur fuglur, funnin í økinum (tíð, staður, slag og orsøk),
- Klagur ella fráboðanir um óljóð, skuggakast ella onnur umhvørvisviðurskifti, og hvat SEV hevur gjørt við tær,
- Onnur viðurskifti av umhvørvisligum týdningi.

[3] **Best Available Techniques**. Hugtakið *besta tøka tøknin* er at skilja sum mest framkomnu framleiðsluhættir, tilgongdir og rakstrarmannagongdir, sum til einhvørja tíð eru mest munadyggar fyri at fyribyrgja og avmarka dálking frá ávísari vinnugrein ella ávísum virksemi. Hugtakið fevnir ikki bert um tøkniligar loysnir, men eisini um t.d. nútímans framleiðsluhættir, nýtslu av minni dálkandi rávørum, avmarking av burturkasti, endurnýtslu og endurvinning, umframt nýtslu av rávørum og orku. Ein treyt fyri at koma undir hugtakið er eisini, at tøknin er roynd og tøk á marknaðinum fyri rímiligan kostnað.

6.6.2. Rakstrarskrásetingar skulu goymast í 5 ár og skulu til eina og hvørja tíð kunna leggjast fyri eftirlitsmyndugleikan.

6.6.3. Elfelagið SEV skal á hvørjum ári gera umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrar-skrásetingum, frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk. Frágreiðingin skal sendast Umhvørvisstovuni í seinasta lagi 1. mars í avloysandi árinum.

### 6.7. Óhapp

6.7.1. Har vandi er fyri spilli av kemikaliium, herundir olju, skal arbeiðast á skynsaman hátt, so at dálking ikki stendst av hesum

6.7.2. Um óhapp henda, sum kunnu føra til dálking av drekkivatninum, skal vatnverkið hjá Tórshavnar kommunu fráboðast beinanvegin.

6.7.3. Henda óhapp við myllunum, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk til avmarking og upprudding. Størri óhapp, útlát ella dálking skulu skjótast gjørligt fráboðast Umhvørvisstovuni[4]. Innan ein vika er farin skal ein frágreiðing um orsøk og møgulig tiltøk til upprudding v.m. sendast Umhvørvisstovuni.

## 7. Eftirlit

7.1.1. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkseminum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

## 8. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Kærur skulu vera Umhvørvisstovuni í hendi í seinasta lagi 13. august 2013.

Suni Petersen, deildarleiðari /

Maria Gunnleivsdóttir Hansen, málsviðgeri

**Avrit:** Tórshavnar kommuna, Postboks 32, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.

[4] Dálkingaróhapp skulu eisini fráboðast til Løgregluna (dálking á landi) ella til Sjóbjargingarstøðina, MRCC-Tórshavn (dálking á sjónum).